Kappsigling hjá Lions Club

TÍÐINDASKRIV
Lions Club

Árliga kappsiglingin við 4- og 5-mannaførum, ið Lions Club, Eysturoy skipar fyri, verður á Skálafirði sunnudagin 23. august 2004 kl. 15.

Hvussu siglt verður eftir fjørðinum í ár verður støða tikin til sunnumorgunin, og fáa bátarnir boð um hetta, tá teir samlast í Heyggstøð á Strondum kl.14 seinnapartin. Málið verður við høvuðspierin í Runavík, og sum vanligt hevur verið, so fáa luttakarnir ein drekkamun við pannukøkum í kantinuni hjá Føroya Fiskavirking, Runavík aftaná siglingina, og verða tá samstundis steyp latin til 3 teir fremstu bátarnar.

William Heinesen á festivali

TÍÐINDASKRIV

Børn við foreldrum, ommum og abbum fingu høvi at hoyra William Heinesen á listafestivalinum "Hippalot" í Hämeenlinna í Finlandi í byrjanini av august mánaði.

Í einari framførslu av Veingjaða Myrkrinum las Hedvig Westerlund-Kapnas, barnasjónleikavørður, søguna hjá Williami, meðan Nikos Kapnas, altfiólleikari, spældi undir við tónlistarliga verkinum hjá Williami "10 variationer av en Færøisk Melodi for Bratsch solo". Tóri í Hoyvík gav eina smakkroynd av føroyskum kvæði, tá menninir vandu brúðarvísu í kjallaranum hjá Óla Snæld, og gjørdi ljóðeffektir til frásøgnina.

Veingjaði Myrkrið er úr stuttsøgusavninum "Fortællinger fra Thorshavn" frá 1973, men varð útgivin sum barnabók av Bókadeild Føroya Lærarafelags fyri nøkrum árum síðani.

Áhoyrarnir á festivalinum vóru heilt úr fýra ára aldri, og áhugavert var at ásanna, at sjálvt heilt ung børn saman við foreldrum verða hugtikin av søguni, hóast finska umsetingin hjá Peter Turtschaninoff á ongan hátt einfaldar málið ella myndburðarnar.

Framførslurnar, seks í tali, eru eitt framhald av sambandinum við barnasjónleikarskúlan Hämeenlinnan Miniteatteri, sum vitjaði í Føroyum í 2002, tá Norðurlandahúsið skipaði fyri norðurlendskari mentunarlegu fyri ung. Luttøkan á finska festivalinum varð stuðlað av Finska Konsulátinum og Norðurlandahúsinum, Sjónleikarhúsið lat búnar og Bókadeild Føroya Lærarafelags lánti út eina fløgu við myndum eftir Edward Fuglø.

Fá signeraða orðabók

TÍÐINDASKRIV

Fríggjadagin 20/8 millum kl. 16:00 & 17:00 verður Gianfranco Contri saman við sínum samstarvsfeløgum í Bókasøluni í SMS, og signerar og prátar um Føroysku/ Italsku orðabókina, sum hann lat úr hondum fyri stuttum.

Gianfranco hevur arbeitt miðvíst við hesi orðabókini í eitt drúgt áramál, seinastu fimm árini ein stóran part av tíðini her á Fróðskaparsetrinum.

Tá hann kom til Føroya fyrstu ferð í 1982 sum ferðamaður, fór hann inn í ein bókhandil og spurdi eftir einari Føroyskt/ Italskari orðabók. Hann fekk at vita, at tað lat seg ikki gera, tí eingin slík var at finna. Hetta fortaldi hann einum vini á Velbastað, sum var knappur at svara aftur, at so mátti hann bara skriva hana sjálvur.

Meðan hann hevur verið her, hevur hann hitt nógv fólk og fingið nógvar vinir. Hann vil fegin sleppa at siga hesum farvæl, áðren hann fer heim aftur til Italiu.

Olav í Snarskivuni

»Men altíð er løtan nýggj - Úti við Á í Kaldbak«

Hósdagin 19. august 2004 kl. 16 letur upp framsýning við fotomyndum hjá Olav Schneider í Snarskivuni.

Snarskivan er kundadiskrin hjá Tórshavnar kommunu, umframt at avgreiðsla hjá Postverki Føroya eisini er har. Í forhøllini, sum er væl egnað til framsýningar av ymiskum slag, skipar mentamáladeildin regluliga fyri listaframsýningum.

Nú verður tað Olav Schneider, sum fer at prýða hvítmálaðu veggirnar í forhøllini við svørt/hvítum myndum - einar 20 í tali, ið hann hevur tikið Úti við Á í Kaldbak í tíðarskeiðinum 1996 til 2001.

Tær eru ein dokumentatión, ein frásøgn í myndum, um menn, bøndur, sum fáast við seyð - ein lýsing av menniskjum í samspæli við náttúru og djór í tilverunnar afturvendandi ringrás.

Sýningin var fyrstu ferð at síggja í Norðurlandahúsinum í 1998. Hesu ferð eru eisini nakrar aðrar myndir við.

Stílurin er klassisk fotodokumentatión - ein stílur, sum Olav ognaði sær í 1995-96, tá ið hann var á Nordens Fotoskola Biskops Arnø í Svøríki.

Olav arbeiðir vanliga sum lærari, men er farin í farloyvi í ár fyri at taka myndir og arbeiða við fotomyndum. Í løtuni arbeiðir hann við eini nýggjari sýning, sum væntandi verður at síggja komandi ár.

Olav Schneider hevur luttikið á Ólavsøkuframsýningum og á Vár-framsýning.

Høvi er at síggja framsýningina, tá ið opið er í Snarskivuni, mánadag - fríggjadag kl. 9-16, tó hósdag kl. 9-18.

Sosialurin
– hevur fingið nýtt telefonnummar
tel 34 18 00
fax 34 18 01
heimasíða: www.sosialurin.fo
teldupostur: post@sosialurin.fo

TOYOTA COROLLA
T-sport 192 HK

ÁRG. JULI 2002 · KM 31.000 · 6 GEAR
TIL SØLU FYRI 190.000 KR
TEL 514716

Annað loyvisumfarið á føroyska landgrunninum

TÍÐINDASKRIV

Eftir at løgtingið í mai mánaða samtykti løgtingslóg um annað útbjóðingarumfar, verður nú lýst eftir umsóknum til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum.

Endamálið við útbjóðingarumfarinum er at tryggja, at arbeiðið sum byrjaði undir fyrsta útbjóðingarumfarinum, heldur fram, soleiðis at staðfestast kann, um kolvetni í rakstrarverdum nøgdum finnast á landgrunninum og at framleiðsla kann spyrjast burturúr.

Tá loyvi verða veitt, verður dentur lagdur á arbeiðsskránna hjá umsøkjaranum, t.e. hvørjar kanningar umsøkjarin ætlar at gera á loyvisøkinum. Somuleiðis verður dentur lagdur á, at føroyskar fyritøkur fáa møguleika at taka lut í virkseminum, soleiðis at leiting eftir olju kann fjøltátta føroyska vinnulívið.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum Bjarni Djurholm sigur, "Annað útbjóðingarumfar er at meta sum eitt náttúrligt framhald av arbeiðinum at finna kolvetni í rakstrarverdum nøgdum á landgrunninum. Vit vilja vísa á nógvu møguleikarnar, sum økið hevur, og serstakliga møguleikarnar at finna stórar kolvetnisgoymslur."

Útbjóðaða økið, ið liggur eystan og sunnan fyri Føroyar, er umleið 19.000 ferkilometrar til støddar og fevnir um 83 heilar teigar og 39 partteigar.

Umsóknarfreistin er sett til 17. november 2004 kl. 12.00.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum miðar eftir at veita loyvi í januar 2005.

Útbjóðingartilfarið og løgtingslógin um annað útbjóðingarumfar til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum fæst við at venda sær til Oljufyrisitingina. Tilfarið liggur eisini á heimasíðuni hjá Oljufyrisitingini á www.ofs.fo.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Oljufyrisitingina
Tlf 35 70 70
Teldupostur: ofs@ofs.fo
www.ofs.fo

Bretskur hernaðarløgreglumaður:

Vitjar aftur í Føroyum aftaná 60 ár

VITJAN
Jan Müller
jan@sosialurin.fo

Við rutuflogfarinum hjá Atlantic Airways úr Aberdeen í kvøld er ein sjáldsamur gestur og Føroyavinur. Talan er umm tann 90 ára gamla Jack Charnock. Helst kennist onkur við navnið frá krígstíðini fyri meira enn 60 árum síðani. Jack Charnock ynskir at minnast aftur á tíðina hann var í Føroyum undir 2. veraldasbardaga. Hetta er fyrstu ferð, at hann vitjar aftur her. Hann tænti sum ovasti í hernaðarløgregluni "Sergeant in the Millitary Police" frá 1940 til 1946. Í 18 mánaðir stóð hann á odda fyri bretsku hernaðarløgregluni, MP, í Havnini.

Seinni fekk hann heiðurstekinið "British Empire Medal for fostering and improving good relations with the Danish & Faeroe community".

Jack Carnock sigur, at honum hevði dámt sera væl at hitt gamlar vinir og kenningar frá tíðini hann tænti í Føroyum. Hann vil eisini hann fegin tosa við skúlar oo, sum kunnu hugsast at hava áhuga í tí tíðini hann var her. Jack verður í Føroyum frá 19. til 22. juli.

Um onkur vil hitta Jack Charnock kann hann seta seg í sambandi við bretska konsulin í Føroyum, Tummas Hanus Dam, á telefon 359977. Fyrrverandi bretski løgreglumaðurin fer at búgva á Hotel Hafnia.

Frí ølsøla í Føroyum

Tað er vorðið alt meira vanligt við fríari ølsølu, tá almenn tiltøk verða hildin í Føroyum. Løgreglan ger einki við tað, hóast tað sambært rúsdrekkalógini ikki er loyvt. Tað er lættari at halda eyga við teimum, sum hava skeinkiloyvi, siga myndugleikarnir

ØLSØLA
Edvard Joensen

Hóast tað er forboðið eftir føroyskari løggávu, er vanligt, at øl verður selt á almennum tiltøkum. Øll vita, at tað hendir, men eingin, sum skuldi havt ábyrgd av hesum, kennir nakað til tað. Og eingin teirra, sum keypir, hevur hug at mótmæla

Mynd: Álvur Haraldsen

Tað er við tíðini vorðið meira reglan enn undantakið, at til ber at keypa meðalsterkt øl, tá almenn tiltøk verða hildin í Føroyum. Hetta hóast tey, sum skipa fyri, ikki hava skeinkiloyvi ella serligt loyvi til hesa sølu. Løgreglan sigur seg ikki kenna nakað dømi um hetta.

Fólk, sum luttaka á størri almennum tiltøkum, meta tað við tíðini sum sjálvsagt, at tey bara kunnu fara at keypa sær eitt glas av meðalsterkum øli, tá teimum lystir. Og vanliga er tað eingin trupulleiki heldur, siga fólk, sum Sosialurin hevur tosað við. Tað riðir seg bæði tónleika og ítróttarlig tiltøk.

Men sambært galdandi lóg um rúsdrekkasølu í Føroyum er tað ólógligt at gera so. Men hóast hetta verður gjørt opinlýst, verður ikki talað at frá myndugleikanna síðu.

Sosialurin tosaði í vikuni við løgregluna í Havn um hetta málið. Men løgreglumaðurin, tosað varð við, segði, at har kendu teir so einki til nakað tílíkt. Hóast hundraðvís av fólki, sum savnað var á tiltøkinum, vistu um hetta og nýttu høvið at keypa sær øl.

Eisini tey, sum reka gistingarhús og matstovur í Føroyum, hava gjørt vart við hetta, sigur Uni Danielsen, sum er formaður í Gistingarhús- og Matstovufelag Føroya.

– Vit hava beinleiðis víst á hendan trupulleikan, og gjørt vart við, at hetta er ikki rætt. Fer nakað sum helst óvanligt fram hjá okkum, um vit, sum hava skeinkiloyvi, er bæði morð og brandur. Men við teimum, sum einki loyvi hava, hendir einki, hóast øll vita, at talan er um beinleiðis lógarbrot, sigur Uni Danielsen.

Hann heldur svarið, løgreglan hevur givið felagnum, vera rættiliga margháttligt. Felagið fekk stutt og greitt at vita, at tað er lættari at halda eyga við teimum, sum hava loyvi, enn við teimum, sum einki loyvi hava.

Øðrvísi kann tað ikki tulkast enn, at um tú ætlar at hava matstovu og skeinkja øl, vín ella rúsdrekka, er bara at lata vera við at søkja um skeinkiloyvi. So er einki eftirlit. Men tað er ikki í tráð við galdandi lóg, at so er.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við vinnumálum, varðar av rúsdrekkalógini politiskt.

Hann sigur seg ikki kenna til nakað ítøkiligt dømi um, at øl hevur verið selt alment uttan loyvi, men hevur kortini hoyrt okkurt smávegis tos, sum bendir tann vegin.

– Tað er púra greitt, at slíkt er ólógligt. Og so eigur løgreglan at taka sær av tí, sigur landsstýrismaðurin.

Í løtuni er einki, sum bendir á, at nakað verður gjørt politiskt við hetta málið, sigur Bjarni Djurholm. Sitandi samgonga hevur ikki viðgjørt rúsdrekkalógina yvirhøvur, hóast hon, eins og aðrar lógir, eisini eigur at verða endurskoðað regluliga.

Men hann vísir á, at hann tvær ferðir fyrr hevur roynt at gjørt broytingar í rúsdrekkalógini, soleiðis at júst hetta við at selja øl alment kann fáast undir skipað viðurskifti. Men hvørgu ferðina fekst politiskur meiriluti fyri uppskoti hansara, sigur Bjarni Djurholm.

Landsstýrismaðurin sigur, at hann kundi hugsað sær, at tað, at størri almenn tiltøk eru, skuldi borið til at selt eitt nú øl skipað soleiðis, at onkur, sum frammanundan hevur skeinkiloyvi, sleppur at standa fyri søluni. So einfalt heldur hann, at hetta málið kann loysast, sigur Bjarni Djurholm.

Tosa um uttanríkispolitikk

Danski uttanríkisráðharrin kunnar føroyskar politikarar um ymisk uttanríkismál, sum hava føroyskan áhuga. Ferðin er heilt ódramatisk, sigur Per Stig Møller

VITJAN
Edvard Joensen

Talan er um eina heilt ódramatiska rutinuvitjan, segði Per Stig Møller, uttanríkisráðharri, tá hann kom í Vágar mikumorgunin

Mynd: Edvard Joensen

Vágar: Uttanríkisráðharrin er komin at hitta landsstýrið og løgtingið fyri at tosa um felags áhugamál, sigur hann. Einki serligt stórmál er á skránni á hesi stuttu vitjanini.

Sum uttanríkisráðharri umsitur Per Stig Møller eisini tey mál, sum viðkoma Føroyum uttanríkispolitiskt, og okkurt er har at tosa um, sigur hann. Eitt nú komandi danskan limaskap í Trygdarráðnum.

Í tí sambandinum ætlar hann at kunna seg um, hvørt føroyingar munnu hava nakur serlig áhugamál ella ynski har, sigur hann.

Eisini verður tosað um millumtjóða handil, og ivaleyst fer eisini ES málið at koma á borðið, sigur hann.

Her eru tað kanska serliga føroyingar, sum eru áhugaðir í at vita, hvussu verður við ríkisfelagsskapinum, um nú Danmark góðkennir ES grundlógina uttan tey fyrivarni, landið hevur, sum er.

Sjálvandi eru eisini onnur uttanríkismál, har Danmark er beinleiðis í eldinum. Eitt nú í Irak, sigur Per Stig Møller. Og hann heldur tað vera rímiligt, at Føroya Løgting verður kunnað um tað málið eisini.

– Hetta er ein heilt ódramatisk vitjan, sum eg vóni fer at gerast eitt árliga afturvendandi tiltak, siugr Per Stig Møller, danskur uttanríkisráðharri. Vit hava fleiri felags áhugamál, og tað er rætt, at vit í felag tosa um tey, segði hann í stuttari viðmerking, beint eftir at hann var lendur í Vágum mikumorgunin.

Uttanríkisráðharrin skuldi avstað aftur longu seinnapartin mikudagin.